## DAGSINS MEINING

# Óvæntað úrslit

Valúrlsitið í Týsklandi gjørdist heilt øðrvísi enn væntað. Hóast veljarakanningarnar í byrjan av valstríðnum bendu á, at stóri andstøðuflokkurin CDU við Angela Merkel saman við CSU fór at verða á odda við 20% í mun til SPD hjá Schrøder, so stóð óvæntað mestsum jøvnum, tá ið avtornaði. CDU varð bert 0,8% frammanfyri SDP og tí vilja bæði oddafólkini vera við, at tey skulu mynda stjórn. Merkel heldur, at hon hóast afturgongd eigur at mynda stjórn, tí flokkur hennara er størstur og SPD hevur havt afturgongd. Schrøder í sínum lagi ger vart við, at ein afturgongd uppá 4,3% í roynd og veru ikki er nøkur afturgongd, tá hugsað verður um støðuna, veljarakanningarnar og valstríðið. Schrøder ætlar sær tí so ella so at mynda nýggju týsku stjórnina.

Tað verður eingin lættur setningur at skipa nýggja stjórn í Týsklandi. Hetta er galdandi uttan mun til, hvør, ið gerst kanslari. SPD hevur lítlan hug til at fara í eina samgongu við CDU og hevur longu boðað frá, at hetta bert verður gjørt, um Schrøder verður kanslari. Merkel hevur boðað frá eini líknandi støðu. Skal stóra samgongan skipast, so skal hon standa á odda fyri hesari samgongu. Í hesi truplu støðu er stóri vinnarin á valinum, liberali flokkurin, komin í eina lyklastøðu. Mangt bendir á, at hesin flokkur kemur at gera av, hvør av teimum stóru skal hava kanslaran. Hetta vil so í báðum førum vera ein minnilutastjórn, ið fer at fáa stuðul frá teimum grønu, tí báðir teir stóru flokkarnir hava avnoktað vinstraflokkin Die Linke, sum hevur røtur til gomlu kommunistarnar í DDR.

Tað er ikki líkamikið, ið skipar nýggja stjórn í Týsklandi. Týskland hevur framvegis og hóast stórar trupulleikar triðsterkasta búskapin í ES. Hetta merkir, at alt, sum hendir í Týsklandi á búskaparliga ella politiska økinum, ávirkar alt Europa og lutvíst heimin við. Evran fall munandi, tá úrslitið kom og týska støðan fer uttan iva at ávirka keypsskálarnar í øllum heiminum. Tað ræður tí um skjótt at skipa nýggja stjórn, so búskaparpolitikkurin verður greiður. Um Schrøder skipar stjórn verður hildið fram við nýskipanarpolitikkinum, hóast hesin politikkur ikki fellur í góða jørð hjá eitt nú fakfelagsrørsluni. Men kann hesin politikkur hinvegin minka um arbeiðsloysið, sum er 11%, so fara fakfeløgini ivaleyst at góðtaka politikkin hjá Schrøder, serstakliga um tey fáa vissu fyri, at vælferðarsamfelagið ikki verður avviklað. Týskland er enn tað land í heiminum, ið hevur bestu vælferðarskipanir, og hesar sleppur Schrøder neyvan at nema. Um tað annars endar við eini Merkel stjórn, so verður vælferðin fyrsta offrið. Hetta fer at geva ófrið og turbulens á arbeiðsmarknaðinum, og tað er tað versta, ið henda kann fyri Týskland, nú arbeiðsplássini flyta til láglønarlondini fyri eystan. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Gjald til rækjuflotan

## Alt truplari at skilja grundgevingarnar fyri rækjustuðli

**Kári P. Højgaard**



Tá samgongan legði uppskot fyri tingið, um at veita rækjuflotanum stuðul, var grundgevingin, at neyðugt var at stuðla hesi vinnu. Føroyingar høvdu vunnið sær søgulig rættindi og nú var vandi fyri, at vit framyvir fóru at missa hesi, um veiðumøguleikarnir ikki vóru troyttir.

Tíverri má ásannast, at rækjuvinnan er í svárari kreppu, nú er bert eitt skip er eftir til fiskiskap. Tað sum kann undra ein er, at uppskot er lagt fyri løgtingið um eykajáttan (lógarbundin játtan) við hesum, eftir míni meting misvísandi viðmerking.

“ Upprunaliga varð mett, at neyðugt var við einari játtan uppá 10 mió. kr. í 2005. ***Fleiri skip hava ikki verið eins nógv í fiskiskapi hesa seinastu tíðina, sum tey vóru fyrru hálvu 2005.*** Nýggjar metingar vísa, at neyðugt verður við einari játtan í 2005 uppá 7,7. mió. kr”.

**Hví verður ikki sagt, at flestu skip eru løgd og manningarnar uppsagdar.** Nú verður eftir stuðulslóg samtykt 14. maj 2005 við afturvirkandi kraft til 1. januar 2005, goldið út til skip, sum eru løgd og/ella flagga út. Bert tað eina rækjuskipið er eftir í vinnu, og kundi ein tí hugsa, at ætlaði stuðulin skuldi verða til at halda lív í rækjuvinnuni, so okkurt skip hóraði undan og kundi fiska ma. rækjurnar í Eysturgrønlandi.

Hvussu verður við hesum rættindunum. Má framhaldandi gjaldast fyri at sleppa at fiska hesar rækjur tá skip, ið hava fingið ávísa kvotu tillutaða, eru løgd ?

16 løgtingslimir atkvøddu fyri stuðulsuppskotinum, ein atkvøddi blankt og 9 vóru ímóti.

Sjálvstýrisflokkurin atkvøddi ímóti.

Kundi skylt at ein ávísur “logikkur” var í øllum, um stuðulin varð galdandi frá tí degi, lógin varð kunngjørd tvs. í maj.

Tann avgerandi spurningurin er. “Hvat ágóða fær samfelagið av at gjalda rokningar aftur til 1. januar fyri skip, sum ikki eru í vinnu”?

# Tveir spurningar til Høgna Hoydal

**Rolf Guttesen**



**Spurningar til fólkatingsmannin Høgna Hoydal, sitandi í "Den Nordatlantiske Gruppe," um talu nr 320 tann 6. september 2005 í Fólkatinginum. Talan var partur av orðaskiftinum um nýggju fíggjarlógina, sum Thor Petersen, fíggjarráðharri hevði lagt fram, har Høgni Hoydal greiddi frá teim politisku og samfelagsligu problemunum í Føroyum, soleiðis sum hann - og Norðuratlantsbólkurin - sær tey.**

1) Hevur Høgni Hoydal sjálvur skriva alla talu nr 320, sum hon er endurgivin á Folkatingsins heimasíðu?

- Um ikki, hvør hevur so?
- Um ikki, hevur Høgni Hoydal ætlanir um at finna sær annan spindoktara at hjálpa sær við taluskrivingini?

2) Hvat meinar Høgni Hoydal við orðingina, at "Det vil svare til, at Grønland havde højhedsretten over hele det nordlige **Atlanterhav med omkringliggende øer** for 9 millioner om året."

- Skal Norðuramerika (USA, Canada og Mexiko) roknast sum ein av hesum omkringliggende øer’?
- Um Norðuramerika ikki er ein oyggj, men eitt kontinent, skulu vit so longur burtur fyri at finna tað, sum er ’omkringliggende’?

**Skriftlig grundgeving:**

- Røða nummar 320 hendan dagin var ógvuliga áhugaverd, tí hon kombineraði eitt nú procentrokning og geopolitikk uppá ein heilt nýggjan máta. Logikkurin má vera, at tess minni blokkurin verður, jú lættari verður hjá føroyingum at kanna sær ’omkringliggende øer’, ja kanska kunnu vit undirleggja okkum heil kontinentir uppá tann mátan.

- Nú er vanligt í demokratinum at krevja skjalainnlit. Til dømis hevur í Fólkatinginum verið spurt um, hvør ið hevur skrivað Drotningataluna í Norðurlandahúsinum, ið var hildin 20. juni ella fyri trimum mánaðum síðani (Betri seint enn aldrin). Hon vísti millum annað til nakrar nýggjari lógir, sum løgtingið hevði samtykt. Spurningurin, sum er settur av fólkatingsliminum Høgna Hoydal, vil avklára hvussu nógv procent er skrivað av ávikavist Ríkisumboðnum, Statsministeriinum og av Drotningini sjálvari. Áhugavert! Hesin spurningur skal nokk loysa nøkur átroðkandi politisk og samfelagslig mál í Føroyum, med omkringliggende øer.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.